BÚSKAPAR- OG LØGFRØÐINGAFELAG FØROYA 2003

Galdandi frá 1. oktober 2003

**1. Sáttmálaskeið**

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2003 til 1. oktober í 2005. Sáttmálin byggir á ein karm, sum er umleið 9%.

**2. Almennar lønarhækkingar**

Lønin hækkar:

1. oktober í 2003 hækkar lønin 3,9 %

1. oktober í 2004 hækkar lønin 4,0 %

**3. Arbeiðstíðin**

Arbeiðstíðin verður frá 1. januar í 2004 at rokna 39,5 tímar um vikuna, íroknað ½ tíma matarsteðg um dagin. Matarsteðgurin verður lagdur í samráð við starvsfólkið, soleiðis at endamálið við matarsteðginum verður rokkið.

Tímalønin fyri hvønn arbeiðstíma verður roknað soleiðis: ársløn/2080

**4. Frí við ongari løn**

Í sáttmálan verður sett nýggj soljóðandi grein:

Tá ið starvsfólk fær tænastufrí við ongari løn, verður gjørdur lønarfrádráttur.

a) Tá ið starvsfólkið er burtur heilar mánaðir, verða drignar heilar mánaðarlønir.

b) Tá ið starvsfólk er burtur vikur, dagar ella tímar, verður drigið fyri teir tímar, tey undir vanligum umstøðum høvdu verið til arbeiðis hetta tíðarskeiðið. Ein tími verður roknaður sum árslønin býtt við 2054. Við í árslønina verða roknað øll gjøld, sum verða goldin sum føst mánaðargjøld.

**5. Meirarbeiðsskyldan**

Meirarbeiðsskyldan verður úr verandi 25 tímum kvartárliga sett niður í 20 tímar kvartárliga, frá 1. januar 2004 at rokna.

**6. Avtala um serstakar frídagar**

**Ein upphædd, svarandi til 1% av karminum 1. oktober 2003, verður nýtt til serligar frídagar.**Sáttmálafrídagarnir fella burtur 1. januar 2004, men nú kunnu starvsfólk vinna sær eina fríviku eyka. Innvinningin fer fram sum tá ið starvsfólk vinna sær frítíð eftir frítíðarlógini. Avtalan er liðilig, soleiðis at fólk, sum ikki vilja hava frídagarnar, í staðin kunnu fáa teir útgoldnar. Virðið á einum frídegi er tá ½ % av einari ársløn.

**7. Førleikamenning**

Partarnir hava avtalað at fara undir strategiska og skipaða førleikamenning.

**8. Starvsaldur**

Í sáttmálans § 22 verður sett nýtt stk. 3.:

*Stk. 3.* Verður starvsfólk sett í starv, áðrenn tað hevur lokið útbúgvingina, ið treytað varð í starvslýsingini, verður tað við setan sett á lønarstig samsvarandi útbúgvingini, tað hevur lokið. Lýkur starvsfólkið seinni útbúgvingina, ið treytað varð í starvslýsingini, fær tað nýggja innplasering við lønaraldri, ið svarar til, at starvsfólkið verður lønt eftir nærmasta hægra lønarstigi í nýggja lønarflokkinum.

Lønaraldurin verður annars soleiðis, at starvsfólk, sum við fyrru innplaseringina hevði komið á eitt lønarstig, sum er javnt við ella hægri enn tað, tað kemur á í nýggju innplaseringini, fær longu frá hesum mundi nýggja aldursviðbót.

Verandi stk. 3 gerst stk. 4.

**9. Broyting í § 13**

"við landsstýrisins góðkenning" verður broytt til "við góðkenning"

**10. Endurskoðan**

Partarnir eru samdir um, saman við avvarðandi myndugleikum, at endurskoða ásetingarnar um, hvørjar útbúgvingar eru fevndar av ískoytinum til sáttmálan og hvussu tær verða flokkaðar. Arbeiðið eigur at vera liðugt í seinasta lagi tann 1. januar 2005.

**11. Avriksløn**

Partarnir eru samdir um í sáttmálaskeiðnum at kanna møguleikarnar at seta í verk nýggjar lønarskipanir.

**12. Burtur úr sáttmálanum**

At strika úr grein 12: páskaaftan, hvítusunnuaftan.

**13. Sjálvboðið eyka arbeiði**

Í sáttmálan verður sett nýggj soljóðandi grein:

Eitt nú tá ið arbeiðspláss er undirmannað í samband við sjúku ella feriu, og eitt nú tá ið serligar uppgávur, sum ikki hava skund, liggja og bíða, kunnu gerast avtalur um sjálvboðið eyka arbeiði. Avtalað verður ein føst tímaløn, og vikið verður frá øllum avtalum um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð o.a. Avtalaða tímalønin kann tó ongantíð vera hægri enn yvirtíðarlønin. Starvsfólkið og

arbeiðsgevarin gera avtaluna, sum skal leggjast fyri álitisfólkið at góðkenna.

**14. Høvuðsavtalan**

Høvuðsavtalan verður endurnýggjað.

*Á Argjum tann 24. november 2003*

Búskapar- og løgfrøðingafelag

Føroya Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið - Kvíggjartún 1 - Postboks 2039 - FO-165 Argir - Tel. 35 20 20 - Fax: 35 20 25
fmr@fmr.fo